## Fundur um Miðeystur

Miðeystur-diplomatar hjá ST, ES, USA og Russlandi hittust í Moskva fyrrapartin at viðgera støðuna, eftir at ísraelska stjórnin hevur gjørt av at byggja 1.600 bústaðir í Eystur Jerusalem. Støðan er ikki batnað av, at ein rakett úr Gaza kravdi eitt mannalív í Ísrael í gjár, og at Ísraels svaraði aftur við at bumba mál í GazA í nátt. ST-aðalskrivarin, Ban Ki-moon, segði í morgun, at ST, ES, USA og Russland fordøma ísraelsku avgerðina um at byggja meiri í Eystur Jerusalem.



## USA hartar Russland

Amerikanska stjórnin er ikki serligan fegin um, at russar hjálpa iranum at byggja kjarnorkuverk. Russar kunngjørdu fyri nøkrum døgum síðani, at eitt kjarnorkuverk í Bushelr verður tikið í nýtslu í juli, men tey tíðindini eru ikki fallin í góða jørð í Washington. Hillary Clinton, uttanríkisráðharri, sigur við russisku tíðindastovuna Tass, at tílíkar verkætlanir eiga ikki at fara í gongd, fyrr enn iranar hava prógvað, at teirra kjarnorkuverkætlan bara hevur friðarlig endamál. Russar siga, at altjóða kjarnorkueftirlitið hevur eftirlit við verkinum í Bushehr.

# Djúpvatnstrolari vorðin kanningarskip






*Ørvingurin Heri Olsen er skipari, og gøtumaðurin Hermann Petersen er maskinmeistari*



*Skiparin farin í telduna at leita eftir Skipssosialinum*



*Kokkurin Virgar á Líknargøtu, sum er úr Saltangará, hevði júst fingið proviant umborð. Fjórði føroyingurin, stýrimaðurin Leivur Matras úr Klaksvík, hevði frívakt, tá vit vitjaðu umborð*

**Nú um dagarnar lá fyrrverandi djúpvatnstrolarin Sancy við bryggju í Esbjerg. Vit vitjaðu umborð**

SKIPAVITJAN
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*
*Myndir: Árni Joensen*

Hóast Sancy varð seldur einum norskum felagi í fjør, og hóast tað norska flaggið er málað á skipið, er tað framvegis sum at koma umborð á eitt føroyskt skip. Tí málið, sum tosað verður umborð, er framvegis føroyskt. Næstan bara. Av teimum seks monnunum, sum eru við Guard Atlantic, eru fýra føroyingar. Hinir báðir eru russar.

Tá norðmaðurin Oddvar Vea keypti Sancy, gav hann skipinum navnið Guard Atlantic, soleiðis sum tað framvegis eitur. Eftir umfatandi ábøtur hjá Mekanik í Runavík fór skipið úr Føroyum seinasta summar.

Hóast navnið Guard Atlantic kundi bent á, at skipið er vaktarskip, hevur tað havt ymsar aðrar uppgávur hesar mánaðarnar síðani eigaraskiftið. Í fjør var tað í Vesturgrønlandi og kannaði ísfjøll sum lið í fyrireikingum til eina komandi oljuvinnu har. Eitt nú varð kannað, hvussu stór ísfjøllini vóru, hvussu mong tey vóru, og hvussu skjótt tey róku.

### Kanna fugl og botn

Tá Sosialurin vitjaði umborð á Guard Atlantic seinasta vikuskiftið, hevði skipið júst verið suðuri í týska partinum av Norðsjónum við nøkrum týskum fuglafrøðingum. Týskararnir høvdu sitið í einum búri framman fyri brúnna og hugt eftir fugli, og harafturat høvdu teir ein serligan fuglaradara, sum stóð afturi á gálganum. Umborð á Guard Atlantic hildu teir ikki, at týskararnir høvdu sæð nógvan fugl. Hinvegin høvdu teir verið sera spentir ein dagin, ein ugla hevði sett seg á skipið.

Nú vóru fuglafrøðingarnir farnir í land, tí teir vóru lidnir við sínar kanningar. Ístaðin fyri skuldi eitt annað týskt granskaralið við Guard Atlantic. Hesaferð vóru tað tveir menn og tvær kvinnur, sum skuldu kanna ymisk viðurskifti á botninum í Týsku Víkini. Útgerð var komin umborð til at taka royndir upp av botni við einum dreggi ella troli, og granskararnir skuldu so kanna og skráseta, hvat kom upp.

Sum skilst skal Guard Atlantic halda fram við ymsum kanningum eina tíð afturat, áðrenn næsta leigumál kemur við øðrum uppgávum.